# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ítróttur og politikkur

Olymisku leikirnir hava allar dagar havt eina ávísa politiska slagsíðu, og tað er einki óvanligt, at land, sum hýsir leikunum, roynir at fáa sum mest burturúr av vælvild og umtalu. Tá leikirnir fara fram í londum, sum eru kend fyri brot á mannarættindi, skapar hetta vanliga nakrar rembingar í demokratiska partinum av heiminum. Fólk seta sær sjálvandi spurningin, um luttøka í leikunum kann metast sum ein altjóða vidurkenning av tí stjórn, sum nú einaferð hevur valdið í vertslandinum.

Spurningurin er nú aftur aktuellur í og við, at Kina skal hýsa komandi olympisku leikunum. Kina hevur sum flestøllum kunnugt sera ringt orð á sær, tá vit hugsa um mannarættindi. Deyðarevsing er sera vanlig, og als einki bendir á, at Kina ætlar nakra broyting á hesum øki. Heldur tykist, sum gongdin er móti enn fleiri framdum deyðadómum og kúgan av fólkaræðiligum rørslum. Tá olympisku leikirnir vóru í Moskva á sinni boykottaði USA við forsetanum Jimmy Carter á odda leikirnar orsakað av sovjetisku innrásini í Afghanistan. Her vóru politikkur, ítrótt og moralur samantvinnað og tað við lít.

Amnesty International hevur longu víst á, at fólkaræðini hava eina moralska skyldu at nýta komandi olympislu leikirnar í Beijing til at tvinga Kina at bøta um mannarættindini í hesum stóra landi. Stjórnirnar fyri vestan eru sera trekar at gera nakað við hetta mál. Í ríkisfelagsskapinum er hetta mál eisini komið á dagsskrá í og við, at røddir hava verið frammi um, at danski krúnprinsurin ikki eigur at taka sæti í altjóða olympisku nevndini, so leingi sum hendan nevnd góðtekur tey vánaligu korini, sum mannarættindi hava í Kina. Hann er ikki sinnaður at víkja sæti. Tað er stórt spell, at demokratisku londini ikki vilja nýta hetta einastandandi høvið at trýsta Kina í mannarættindaspurninginum. Orsøkin er, at Kina er vorðin eitt búskapaligt stórveldi, sum eingin torir at fornerma og taparin í hesum spæli eru tær demokratisku kreftirnar í diktaturstatinum Kina og harvið eisini demokratiið í øllum heiminum.

**Sosialurin**

## Jú, Dimma, fleiri stig eru tikin um "Framtíðar sjúkrahúsverk" - og fleiri verða umrødd í politisku samgongusamráðingunum

**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður



Tað er ikki rætt, tá Dimma skrivar í eini grein í vikuskiftinum, at "so at siga onki" er gjørt við álitið um "Framtíðar sjúkrahúsverk í Føroyum", sum undirritaði legði fram síðsta vár og sum var til aðalorðaskiftis í løgtinginum.

Í álitinum eru tilsamans 30 ítøkilig tilmæli. Á fleiri økjum eru vit komin væl áleiðis, hóast ikki eitt ár enn er liðið. Dimma nevnir bara nøkur fá av tilmælunum, tey sum snúgva seg um tann yvirskipaða bygnaðin. Tað er rætt, at har er enn onki stig tikið til broytingar. Men tað verður ein av teim komandi stóru og spennandi avbjóðingunum.

Tey flestu av tilmælunum snúgva seg um ymisk viðurskifti viðvíkjandi sjúklingunum og starvsfólkunum (nr. 1-16) Bæði út frá hesum tilmælum og út frá samskifti, eg havi havt við umboð fyri leiðslu og starvsfólk, hevur verið arbeitt við eini menningarstrategi á Landssjúkrahúsinum.

Nú í jan. eru tey liðug við útkastini til innsatsin, ið skal gerast á 5 fokus-økjum:
- sjúklingaviðurskifti
- samskifti og kunning
- starvsfólkaviðurskifti
- kunningartøknilig viðurskifti
- fíggjarviðurskifti

Tað sum nú stendur á skránni, er at fáa ein dialog millum allar partar á sjúkrahúsinum, um hesi útkast, og hvussu ætlaninar skulu fremjast.

Nøkur av tilmælunum í álitinum snúgva seg um heilsufremjandi virksemi (m.a. nr. 4). Her eru vit jú komin væl ígongd við Fólkaheilsuætlanina, bæði við fyribyrgjandi heilsukanningum og ymiskum heilsuátøkum, eins og Fólkaheilsuráðið er styrkt og hevur fingið til uppgávu at útinna ætlaninar.

Tilmæli nr. 9 er longu framt, nevnliga at skipa fyri nøgdsemiskanning millum sjúklingar.

Tilmæli nr. 8 er sett í gongd, at fáa yvirskipaðar viðgerðarvirkisætlanir. Her havi eg sett ein bólk at gera ein Krabbameinsvirkisætlan, sum skal verða liðug í vár.

Tilmæli nr 7 snýr seg um viðgerðartrygd, sum ikki kann sigast annað enn at verða sett væl og virðiliga á politisku skránna nú í farna valstríðnum, og sum væntandi verður at finna í komandi samgonguskjalinum.

Tilmælini nr. 10 og 13 snúgva seg m.a. um strategiskt samstarv við sjúkrahús uttanlands. Hetta var av álvara farið undir í fjør, bæði við at fyrireika eina avtalu við íslendska Landsspitalið, og við at fáa samband í lag við skotska heilsuverkið.

Tilmæli nr. 11 snýr seg um tørvin fyri at fáa eina raðfestingarætlan fyri serlæknaøkið. Hetta var við í fíggjarlógaruppskotinum bæði fyri 2007 og 2008. Og fer at standa frammaliga í raðfestingunum hjá komandi samgongu.

Tilmæli nr. 19 snýr seg um at fáa tættari samband millum sjúkrahúsjáttan og játtan til serviðgerð uttanlands. Fyrsta stig til hetta varð tikið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2008.

Tilmælini nr. 23 og 24 snúgva seg m.a. um leiklutin hjá Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahúsi í samband við uppafturvenjing. Júst hetta er blivin ein týðandi táttur í uppskotinum um eina Endurvenjingarætlan fyri fólk við førleikatarni, har hesi bæði sjúkrahúsini skulu verða miðstøðir fyri endurvenjingina í Føroyum.

Tilmæli nr. 26 snýr seg um samskipan av sjúkraflutninginum og prehospitalu tilbúgvingina. Eisini á hesum øki hava vit fingið gjørt eitt ítøkiligt uppskot, sum ætlanin er at fara at arbeiða við í hesum ári.

Hinvegin er tað rætt, at tey ítøkiligi tilmælini um tann yvirskipaða bygnaðin millum tey 3 sjukrahúsini, sum Dimma serliga ger nógv burturúr, har eru ikki enn tikin politisk stig. Men tað verður uppgávan hjá komandi landsstýrismanninum at fara ígongd við hesa stóru uppgávuna, nú tá nýggj politisk samgonga fer at vera skipað.

Hvat ið mínar ætlanir eru, havi eg víst týðiliga í blaðgreinum, bæði áðrenn og í sjálvum valstríðnum. Eisini um hvussu vit skulu arbeiða við teim bygnaðarligu viðurskiftunum. Serliga vil eg vísa til tær 3 greinarnar:

"Soleiðis tryggja vit dygd og góðsku á sjúkrahúsunum",

"Viðgerðartrygd fyri sjúklingar innan 2-6 vikur" og "Kvalitetsreformur fyri sjúkrahúsverkið

Greinarnar eru at finna bæði í Dimmu og Sosialinum, og harumframt á mínari bloggsíðu undir Valevnir á heimasíðuni hjá Javnaðarflokkinum,

www.j.fo

## Loysing

**JOHAN DALSGAARD**

Danskarar eru eitt fólk. Teir elska sínu egnu. Danskarar lurta eftir Gasolin og Shubidua. Og teir eru stoltir av, at allur heimurin nýtir vitanina hjá H. C. Ørsted og Kierkegaard og vita, at øll hoyra søgurnar hjá H. C. Anedersen. Tá danskarar koma saman, savnast teir um danskarar, sum Dirch Passer, Tv2 og Linie3 og eru saman við hvørjum øðrum.

Føringar eru størri og annaðleiðis. Teir importera stór verðinsnøvn. Í Føroyum hava nógvar stjørnur verið. Føroyar eru fantastiskar, tí øll møgulig kend hava verið í Føroyum.

Men Danskarar sýnast at tykjast best um sínu egnu.

Danskarar elska Danfos og Damixa.

Lat okkum loysa frá Danmark og lata Danmark fáa frið.

Danmark hevur ikki brúk fyri einum hjálandi, sum ikki eingang orkar fyri sær sjálvum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.